


*50 ár sunnudagin. Og kortini heili 15 ár á fremstu rók innan føroyska fíggjarheimin. Hann hevur í meðal kunnað víst á eitt avlop á 200 milliónir krónur, og sum formaður í felagnum fyri føroyskar peningastovnar eigur hann eitt týðandi íkast í búskaparliga kjakið í Føroyum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

tíðarskeið renna mær í hug. Fyrst og fremst fyrsta tíðin við kreppuloysnum var eitt tíðarskeið, har vit veruliga gjørdu mun. Tað var ein spennandi tíð at vera við til at reisa landið aftur á føtur, sigur Janus Petersen.

Hann nevnir tað eisini sum eina uppliving, at vera við til at seta tryggingarfelagið Trygd á stovn.

- Tað var spennandi at vera við til at fáa avtikið einkarættin til trygging í Føroyum, og fáa skapt kapping á tí økinum eisini, sigur Janus Petersen.

Og í triðja lagi hevur tað verið eitt sera spennandi og týðandi tíðarskeið eftir, at hann gjørdist forstjóri í bankanum.

- Tað hevur verið eitt heilt serligt tíðarskeið hesi árini, síðani eg gjørdist forstjóri í Føroya Banka. Fyrst og fremst var tað arbeiðið við at fáa bankan skrásettan á børsinum, sum var ein spennandi avbjóðing, men eisini tað, at hava sæð bankan vaksið í vavi til tað tvífalda hevur verið sera áhugavert, sigur Janus Petersen.

Og bankin er í støðugari menning, og hevur eina vakstrarætlan, sum røkkur út um landoddarnar.

- Tað er sum ein liður í okkara vakstrarætlan, at vit í gjár kunngjørdu, at vit høvdu latið inn eitt boð at keypa Fionia Bank. Tað er eyðvitað ikki sjálvsagt, at vit fáa bankan, men boðið er so latið inn nú, sigur Janus Petersen.

## Lív uttan fyri bankan

Men alt er ikki bankar og pengar hjá føðingardagsbarninum. Hann hevur eisini eitt lív uttan fyri forstjórastarvið.

- Tónleikur hevur altíð fylt nógv í mínum lívi og ger tað enn tann dag í dag. Bróður mín, Petur Birgir Petersen, er útlærdur á konservatoriinum, og tað hevur sjálvandi havt eina ávirkan á mín áhuga fyri tónleiki, sigur Janus Petersen.

So stóra ávirkan, at hann mest sum dagliga hevur gittaran á lofti eina løtu, og fegin spælir nøkur løg, tá bankin hevur veitslu.

- Men hjá mær er tað á ítrivsstøði, og ikki sum hjá Petur Birgiri professionelt, sigur forstjórin í Føroya Banka.

Janus Petersen er eisini familjumaður, giftur Margret Mortensen, og saman eiga tey trý børn.

Og so hevur forstjórin í Føroya Banka enn eitt frítíðarítriv, renning.

- Eg haldi, at tað er ein »neyðvendigheit«, at halda seg í form. Eg renni nógv og havi eisini luttikið í marathon í Berlin, London, Keypmannahavn, París og tvær ferðir í Havn, sigur Janus Petersen.

Og hann ætlar at halda fram við at halda seg í form, eins og hann ætlar at halda tónleikin viðlíka. Men hvar sær hann seg sjálvan um onnur 15 ár?

- Tað er ilt at siga. Tað avgerandi er, at ein leiðari hevur visiónir og ágrýtni at føra tær út í lívið. Hevur hann ikki tað, er betri at hann gevst. Um eg verið forstjóri í Føroya Banka um 15 ár veldst alt um, antin eg havi nakað at geva ella ikki. Tað kann bara tíðin vísa, sigur Janus Petersen, forstjóri í Føroya Banka, sum fyllir 50 ár sunnudagin.